# Vóru óhepnir

Miðlarnir í Eysturríki hava úr at gera við at tosa við fyrrverandi landsliðsspælarar um skommina, sum teir áttu ábyrgdina av í Landskrona á sinni. Ikki óvæntað er ein av spælarunum Toni Polster, sum í drúgt áramál var størsta stjørnan í eysturríkskum fótbólti. – Vit vóru ótrúliga óhepnir handan dystin. Eg veit ikki, hvussu ofta eg rakti hasa topphúgvuna hjá málverjanum ella stólpan, tók stóri áleyparin heldur speiskliga til.



# Hickersberger hjá Krankl

Josef Hickersberger, sum var venjari hjá Eysturríki í 1990, og sum aftur var venjari til EM-endaspælið í summar, verður ein av teimum, sum fer at gera sínar viðmerkingar um dystin á Tórsvølli leygardagin. Hickersberger fer at hyggja at dystinum á eini lokalari ítróttabar, sum fyrrverandi stórspælarin Hans Krankl, eigur. Og eftir dystin fer hann so at geva síni skoðsmál um avrikið hjá landsmonnum sínum.



*Jógvan Martin Olsen hevur ongan tíð áður upplivað slíkan áuga fyri føroyska landsliðnum, sum hann gjørdi tað í Wien fyri viku síðani*

# Landskrona á skíggjanum

**Sum upphiting til stórdystin leygardagin fer Sjónvarpið hjá Kringvarpinum at senda Landskrona dystin móti Eysturríki**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin klokkan 16 verður dysturin, sum tey flestu rokna sum ein tann størsta hjá føroyska fótbóltslandsliðnum í nógv ár.

Fyri framman stendur Eysturríki, og tað vekir sjálvandi bæði stór og gleðilig minni hjá hvørjum tí einasta føroyska fótbóltsfjeppara.

Sjónvarpið sendir sjálvandi frá dystinum, og leygardagin verður talan hálvavegna um fótbóltsmarathon á skíggjanum. Sum upphiting fer Sjónvarpið nevnliga at senda minniliga dystin frá Landskrona, tá Føroyar bastu Eysturríki, og byrjar hetta klokkan 14.

- Tað eru jú liðin 18 ár síðani, at hasin dysturin varð spældur. Og tey, sum í dag eru um 20 ár og yngri, hava kanska als ikki sæð dystin. Tey hava sjálvandi hoyrt um hetta og helst eisini sæð málið hjá Torkili, men ikki dystin í síni heild. Tí kom hetta hugskotið fram, og tað vann alt fyri eitt frama her í húsinum, sigur Tórður Mikkelsen í Sjónvarpinum.

- Og so kann tað eisini vera stuttligt hjá okkum øðrum at síggja hendan dystin aftur. Nógv verður í dag kjakast, um nøkur framgongd hevur verið síðani, so nú kunu fólk gera sína egnu meting, um tey síggja báðar dystirnar.

Og verður meira gjørt burtur úr hesaferð, enn tit vanliga gera til landsdystir?

- Tað verður sjálvandi eitt sindur eyka. Vit tosa í løtuni um, hvat og hvussu vit gera hetta. Men eg fari so ikki at nevna smálutirnar her og nú, sigur Tórður Mikkelsen, sum sjálvandi verður av teimum, sum fara at siga frá dystinum leygardagin.



*Málið hjá Torkili eftir 61 minuttum hava tey flestu sæð. Leygardagin verður møguleiki at síggja allan Landskrona-dystin, tá samlaði føroyski fótbóltsheimurin fær eitt nostalgi-trip aftur til 1990*

ríksku pressuni?

- Tað sama, sum eg fari at siga við spælararnar og við allar føroyingar. Tað er, at tað er týdningarmikið, at vit hava í huga, hvørjar fyritreytirnar vóru í 1990 bæði hjá eysturríkska liðnum, sum stutt frammanundan hevði luttikið í HM endaspæli í Italia. Og hvørjar fyritreytirnar vóru hjá føroyska liðnum, sum ongantíð áður hevði luttikið í undankappingardysti.

- Ta ferðina høvdu okkara spælarar hundrað prosent fokus á stóru uppgávuni, sum var fyri framman, og tað hevði stóran týdning. Um vit megna at halda okkum til sama útgangsstøði og sama fokus, sum Føroyar høvdu fyri átjan árum síðani, so verður útgangsstøðið leygardagin, sum tað eigur at verða, staðfestir venjarin.

## Føroyar vekja ans

Á FIFA listanum hevur føroyska liðið ongantíð verið niðari, enn tað nú er tað. Orsøkin er sjálvandi tann, at úrslitini ikki hava verið nóg góð til at hildið tørn um plaseringina, sum fyri ikki so nógvum árum síðani var á 112. plássi á FIFA listanum ella næstan 90 pláss hægri, enn liðið nú er at finna.

Tá Føroyar síðst spældu á heimavølli, var tað ímóti Rumenia. Tá var stórur denturlagdur á verjuspælið, og tað var ikki frítt, at tepra 1-0 tapið og royndin síðsta hálva tíman at javna vakti ans kring heimin.

21. november í fjør var føroyska liðið í Modena í Italia. Tá var úrslitið 3-1 til italsku heimsmeistararnar.

Millum teir landsliðsvenjararnar, sum luttóku á fundinum í Wien, og sum føroyski venjarin prátaði við, var venjarin hjá enska landsliðnum. Tað er italiumaðurin Fabio Capello.

Tá Føroyar fyri knøppum ári síðani spældu í Modena, var Capello viðmerkjari hjá sjónvarpinum, og nú hann hitti føroyska venjaran, endurtók hann skoðsmáli, sum hann segði seg hava givið føroyska liðnum í italska sjónvarpinum:

- Fokus hjá honum var ikki á italsku heimsmeistarunum, men heldur á føroysku amatørunum. Hann hevði á orði, at okkara lið var sera væl skipað og við røttum hugburði og fokus. Sjálvandi er tað hugaligt at hoyra ein sovornan kapasitet geva okkara liði eitt sovorðið skoðsmál. Eg var sera væl nøgdur við hugburðin og avrikið í Italia. Vit vóru hundrað prosent savnaðir um uppgávuna. Verjuparturin var sera væl frágingin. Samstundis megnaðu vit at spæla okkum til málmøguleikar, og Rógvi skoraði eitt mál. Um vit fáa fatur í hesum leygardagin, vera væl skipaðir og samstundis lúra eftir møguleikunum, so hava vit tikið fyrsta stigi ímóti møguleikanum fyri, at úrslitið ímóti Eysturríki fyri átjan árum síðani kann endurtakast, sigur Jógvan Martin Olsen.

Stevnan í Wien var frá næstsíðsta sunnukvøldi og til mikudagin fyri einari viku síðani. Millum teirra, sum løgdu fram, vóru eisini brasilski Carlos Perreira og Aragones úr Spania.